# Frá seks til hundrað prosent

**Tølini hjá TV2 vóru frá 2001, men danska sjónvarpsrásin heldur seg ikki hava gjørt nakað skeivt. Fiskimannafelagið vísir á, at manningarnar á nótaskipum mynda seks prosent av samlaðu manningini við størru skipunum**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Tað eru tøl fyri manningahýrur á nótaskipum í 2001, sum í hesum døgum fáa danskar politikarar at seta spurnartekin við blokkstuðulin til Føroya.

Danska sjónvarpsrásin TV2 heldur fast við sítt.

– Vit kundu kanska verið meira nágreinilig og sagt, at tølini vóru fyri nótaskip í 2001, men vit taka einki aftur, sigur Lotte Mejlhede, undirstjóri á TV2 tíðindadeildini.

Tað varð í innslagnum, sum TV2 sendi mánakvøldið, sagt, at føroyskir fiskimenn við teimum stóru skipunum forvunnu 664.000 krónur árliga eftir skatt.

Tølini hjá TV2 eru fingin til vega frá heimasíðuni hjá Føroya fiskimannafelag, verður sagt.

Formaðurin fyri Felagið nótaskip, Atli Hansen, sigur, at í 2001 vóru átta nótaskip í flotanum. Síðani er


*Miðaltalið fyri hýrurnar 6% av føroysku fiskimonnum við "størri" skipum er grundarlagið undir tí nógv umrødda innslagnum hjá TV2*

talið av skipum minkað til sjey.

– Í alt hevur manningatalið verður umleið hundrað mans fyri øll skipini. Harav hava kanska 70 mans forvunnu hasa miðalinntøkuna, sigur Atli Hansen.

Atli Hansen leggur afturat, at 2001 var eitt av teimum góðu árunum, sum nótaskipini upplivdu í árunum 1999 til 2002.

Tøl frá Føroya Fiskimannafelag vísa, at fiskimenn við nótaskipum mynda 6% av samlaða manningatalinum við "stórum" skipum. Hetta merkir, at hvør fimtandi fiski-maður við stórum skipum siglir við nótaskipum.

## Einki skeivt

Lotte Mejlhede heldur sum sagt fast við, at tey ikki hava gjørt nakað skeivt í innslagnum. Við Útvarp Føroya sigur hon, at innslagið varð gjørt fyri einum mánaði síðani, og tá vóru tey feskastu tølini, ið vóru tøk, nýtt.

Men Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum, heldur, at grundleggjandi journalistisk prinsipp eru brotin.

– Tá mál av hesum slagnum stinga seg upp, so eigur tú sum journalistur at ansa ótrúliga væl eftir, at alt er rætt, sum tú ber fram, sigur Óli Jacobsen.

Tíðindakvinnan Line Geertsen, sum hevur gjørt innslagið, hevur sett seg í samband við Òla Jacobsen og Føroya Fiskimannafelag. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa fatur á henni.

Óli Jacobsen sigur Íblásturin til innslagið kom frá einari grein í Berlingske Tidende um skattalætta og blokkstuðul fyrst í juni, ið nógv óivað minnast.

## Danir fáa fyrimunir

Í innslagnum hjá TV2 verður róð framundir, at orsøkin til, at føroyskir fiskimenn kunnu vinna sær so nógvan pening er skattalættin til sjómenn, sum verður fíggjaður av blokkstuðulinum.

Hvørki Atli Hansen ella Óli Jacobsen halda nógv um, at hesir táttir verða koplaðir saman á henda hátt.

– Nótaskipini høvdu nøkur góð ár. Og tað høvdu tey havt við ella uttan nakran blokkstuðul, sigur Atli Hansen.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum heldur somuleiðis, at tað ikki er rætt at gera sær tílíkar niðurstøður.

Óli Jacobsen vísir eisini á, at danskir fiskimenn ikki eru heilt fyriuttan skattafyrimunir.

– Danskir fiskimenn hava eisini ein skattalætta og aðrar fyrimunir, sigur Óli Jacobsen.

# Sum heitt breyð

**Samskiparin fyri Listastevnuna heldur, at føroyingar eru ógvuliga tilvitaðir um góðsku. Í ár eru føroyingar eisini skjótir eftir atgongumerkjum**

LISTASTEVNAN
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Ársins Listastevna fer av bakkastokki 6. august. Eftir at fyrireikararnir og áskoðarar hava lagt tríggjar stevnur afturum seg, so er í øllum tað broytt, at áskoðararnir eru so grammir eftir atgongumerkjum, at ein fittur partur longu er seldur í forsølu.

– Føroyingar eru øgiliga tilvitaðir um góðsku. Vit fáa øgiliga nógvar afturmeldingar frá fólki. Tað mesta positivt, men eisini góður konstruktivur kritikkur, sigur Oddvá Nattestad.

Tey umleið níggjuhundrað atgongumerkini til Jethro Tull vórðu seld eftir fáum døgum. Men eisini onnur tiltøk hava gingið væl at selt hjá at-gongumerkjasøluni.

Heimsstjørna Kiri Te Kanawa veit í øllum førum, at meira enn tveir triðingar av stólinum í salinum verða upptiknir, tá hon fer at syngja 7. august. Konsertin hjá Kiri Te Kanawa verður fyri umleið 390 fólkum. Á konsertini hjá Jethro Toll verður stóri salurin opin aftur í Klingruna, soleiðis at pláss er fyri teimum níggjuhundrað fólkunum. Tað er ikki vist, men tað er møguligt, at konsertinar hjá Teituri og Eivør eisini verða fyriskipaðar á henda hátt. Bæði


*Tbilisi marionett er ein heldur øðrvísi lýsing av blóðuga slagnum um Stalingrad.*

Teitur og Eivør selja væl.

Oddvá Nattestad, samskipari fyri Listastevnuna, sigur, at eisini onnur tiltøk ganga væl í forsølu.

Eitt tiltak, sum fyrireikararnir hava hug at nevna, er marionett leikurin the Battle of Stalingrad. Tað er Tbilisi Municipal Theatre, ið framførir. Hesin leikurin hevur fingið framúr góð ummæli aðrastaðni, men vitanin millum manna í Føroyum er mestur rættiliga avmarkað.

## Føroyskir framsýnarar

Fitt av føroyskari list sleppur eisini framat á stevnuni. Eitt nú eru fleiri framsýningar við føroyskum listafólki. Vit hava spurt samskiparan, um tað er eitt mál í sær sjálvum at hava ein ávísan part av føroyskari list?

– Stýrið strembar eftir, at so nógvar listagreinir sum gjørligt eru við, at fáa føroysk listafólk, norðurlendsk listafólk og altjóða listafólk - á einum listaligum høgum støði, sigur Oddvá.



# Dálking runt Eiðisvatn




*Órudd og rusk liggur og flýtur kring Eiðisvatn. Hóast onki fólk er at síggja, so sæst, at vitjandi hava verið, ið ikki hava ruddað upp eftir sær*

Í vikuni var onkur ein túr kring Eiðisvatn. Ikki eitt menniskja var at síggja, men kortini sást væl, at har høvdu verið fólk. Viðkomandi hevur sent Sosialinum hesar myndirnar.

Rusk, tómar fløskur og annað lá rak rundanum vatnið, tí gestirnir høvdu ikki verið nakað serliga raskir at rudda upp eftir sær – og tað kann ikki sigast annað enn vera harmiligt.

**-ib**

# Herverk á bjargingarútgerð


*Línan, sum hoyrir til annan bjargingarkransin við Gróthústanga, varð herfyri skorin av og stolin. Nú hevur Reyði Krossur Føroya hongt nýggja línu upp. Formaðurin hamast um, at slík útgerð ikki fær frið*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Onkur hevur gjørt seg inn á annan bjargingarkransin, sum hongur við Gróthústanga við Leitisvatn í Vágum. Tað er Reyði Krossur Føroya, sum hevur hongt kransin upp**

HERVERK
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Línan, sum hoyrir til ein bjargingarkrans, sum hongur við Gróthústanga í Vágum, er skorin av og er horvin. Kransurin sjálvur hekk einamallur eftir, men er ikki til nakra nyttu, tá ikki øll útgerðin er tøk.

Tað er Reyði Krossur Føroya, sum hevur hongt útgerðina upp við Leitisvatn, eins og gjørt er aðrastaðni í landinum. Tilsamans hevur Reyði Krossur Føroya hongt 18 bjargingarkransar upp ymsastaðni í landinum, sigur Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi Føroya.

Fólk frá Reyða Krossi Føroya hava verið og hugt at útgerðini og staðfest, at herverk er framt.

– Tað er harmiligt, at so skal vera, sigur formaðurin, tí hetta er ikki hongt upp fyri okkara skuld, men til at hava til at taka hjá tiemum, sum ferðast her, um brúk skuldi verðið fyri tí. Og ein bjargingarkransur við ongari línu er lítið verdur, sigur hann.

Hóast tað er Reyði Krossur Føroya, sum hevur fingið útgerðina til vega og hongt hana upp, er tað Lions Club Vágar, sum fíggjaði uppsetingina frá byrjan, sigur Suni Vinther.

Hann greiðir frá, at fýra slíkir bjargingarkransar hanga við Leitisvatn. Tveir eru við Gróthústanga, ein er á sandinum í Vatnsoyrum, og ein er á flúgvarabedingini.

– Tá vit vóru í Vágum og kannaðu útgerðina hendan dagin, hongdu vit eisini ein bátshaka upp á flúgvarabedingini, sigur Suni Vinther.

Reyði Krossur Føroya hevur eisini eitt skelti, sum verður sett upp, har bjargingarkransar eru fram við sjónum. Á hesum skelti er ein ávarðing og ein áheitan á fólk um ongantíð at lata smábørn ferðast fram við bryggjukantum ella í fjøruni uttan at vera ílatin bjargingarvest, sigur formaðurin í Reyða Krossi Føroya.

Suni Vinther letur annars at, at útgerðin sum heild fær frið. Tó hvarv annar kransurin í Sandágerði nú fyri stuttum. Allur sum hann var. Har varð so beinanveg hongdur ein nýggjur uppaftur, sigur hann.



Plastikk á ólavsøku

Eftir áheitan frá Tórshavnar Býráð, tappa vit avmarkaða nøgd í 1/2 litur plastikkfløskur, mánadagin 26. juli.

Fæst bert á goymsluni við Landavegin fram til ólavsøku.

Restorffs
BRYGGJARÍ